# BÓKHALDARI/ FÍGGJARLEIÐARI

P/F Viking Seafood søkir eftir fólki at taka sær av dagliga bókhaldinum og øllum fíggjarligu uppgávunum á virkinum.

P/F Viking Seafood er ein av alifyritøkunum her á landi. Vit hava alistøðir á Funningsfirði og á Kaldbaksfirði og hava kryvjivirkið og søludeild á Strondum.

Fyri at halda skil á fíggjarviðurskiftum okkara, hava vit brúk fyri einum dugnaligum fólki, sum kann taka sær av lønarfyrisitingini, allari bókføringini og at gera tær fíggjarligu uppgerðirnar, sum eru neyðugar hjá dagligu leiðsluni, fyri at hava tey kravdu stýringsamboðini. Tað eru tíðarskeiðsroknskapir og ymiskar hagtalsuppgerðir, sum kunnu fáast frá teimum dagligu skrásetingunum.

Í høvuðsheitum væntar leiðslan, at bókhaldarin/fíggjarleiðarin tekur sær av:

- lønarfyrisitingini
- at føra bókhaldið
- at gera tíðarskeiðsroknskapir fyri deildirnar
- at gera ársroknskapin fyri felagið
- at menna og samskipa innanhýsis mannagongdir á virkinum
- at hjálpa dagligu leiðsluni at gera fíggjarætlanir
- at fylgja við ætlanunum og samanhalda tær við roknskapin
- at hjálpa til á øðrum økjum, tá tað krevst

Fyri tann rætta persónin er hetta eitt avbjóðandi, spennandi og mennandi starv, har tú kemur at arbeiða rættiliga sjálvstøðugt, tó í tøttum samstarvi við arbeiðsfelagum.

Vit krevja ikki, at tú hevur lokið nakra serliga ástøðiliga útbúgving, men at tú kanst røkja tær uppgávur, ið starvið krevur, og ert lættur/løtt at samstarva við.

Lønarviðurskiftini verða avtalaði við leiðsluna.

Tey, ið ætla at søkja, kunnu senda mail til bj@viking-seafood.fo ella senda skrivliga umsókn við prógvum og møguligum ummælum í seinasta lagi 27. februar 2008 til

**P/F Viking Seafood**
**Heygsstøð 2**
**490 Strendur**

Stílað Brandi Jacobsen, stjóra

Um møguligir spurningar eru, kanst tú ringja til Brand á fart. 585051

## VIKING SEAFOOD P/F

Heygsstøð 2 · 490 Strendur · Tel 449010 · Fax 449410



www.sosialurin.fo

Starvslýsing – vaskifólk

# Vaskifólk til miðlahúsið

Søkt verður fólki at vaska í Miðlahúsinum 3,5 tímar fimm dagar um vikuna.

Vendið tykkum til Jan Müller

**Miðlahúsið**
341800
jan@sosialurin.fo

Sosialurin · Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

Sosialurin

# SUDOKU

Hvønn dag í februar mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 10. mars 2008 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður aðru vikuna í mars.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Telefon: ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinnari av Januar-kappingini:**
**Johanna Rasmussen**
**Inni í Firði 121, 410 Kollafjørður**

## Vinningurin í februar

In•tone clinic letur vinningin í februar, sum er eitt gávubræv á 12 viðgerðir, virði kr. 4.200,-.

## FEBRUAR-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 6 | | | | 8 | | |
| | 7 | | | | | | 2 | |
| 8 | | | 7 | | 5 | | | 9 |
| | 8 | | 9 | | 6 | | 5 | |
| | 6 | | | | | | 7 | |
| | 3 | | 1 | | 8 | | 4 | |
| 1 | | | 5 | | 4 | | | 3 |
| | 2 | | | | | | 9 | |
| | | 8 | | | | 4 | | |



Stramma kroppin uttan skurðviðgerð

FEBRUAR-TILBOÐ
Kom so ofta tú hevur hug í ein heilan mánað
Mánaðarkort bert kr. 3.900,-

**Opið er soleiðis:**
Mánadag, týsdag og hósdag......10.00-18.00
Mikudag og fríggjadag ...............11.00-18.00

in•tone clinic
J. Paturssonargøta 18 · Tórshavn · Tel 322045